## HB vann steypadystin

HB vann 3-0, tá teir á Tórsvølli spældu ólavsøkudyst móti grannunum úr B36. Fyri steðgin var talan fyri tað nógva um ein undirhaldandi dyst, men tá bæði liðini framdu nógvar útskiftingar, minkaðu intensiteturin spakuliga. Málskjúttar hjá HB vóru Andrew av Fløtum, sum skoraði tvær ferðir, og Páll M. Joensen. Eftir dystin fekk HB steyp til ognar frá býráðnum.



## AaB í UEFA-Cup

Eftir 1-1 javnleik á útivølli spældi AaB seg í gjár víðari í UEFA-Cup kappingina. Tað stóð tó nógv á, og eftir lítlum hálvum tíma legði Gent seg á odda. Danny Califf jevnaði tó løtu seinni, og 10 minuttir fyri leiklok skoraði Andreas Johansen málið, sum sendi AaB víðari. Hvørgin av føroysku landsliðsspælarunum var á vøllinum fyri AaB.

# Gullið fór til Sundalagið



*Tað er øgiliga keðiligt ikki at vinna ólavsøkuna, tá man hevur vunnið FM, og tí hevði tað nógv at siga fyri okkum at vinna gull í síðsta róðrinum, sigur Ingibjørg Reinert, róðurskvinna á Hvassa*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sjálvt um Hvassi hevði tryggjað sær meistaraheitið hjá 5-mannaførum við gentum undan ólavsøkuróðrinum, so hava fleiri av róðrunum í ár verið rættiliga spennandi, og tí var ikki óhugsandi, at onkur av hinum bátunum kundi hótta Hvassa**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hvassi hevði longu tryggjað sær meistaraheitið hjá 5-mannaførum við gentum undan róðrinum á ólavsøku, men allíkavæl tóktist spenningurin vera stórur undan síðsta róðrinum í ár.

Fleiri av undanfarnu róðrunum hava nevniliga verið rættiliga spennandi, og tí var eingin ivi um, at bæði Drekin og Tambar enn einaferð ætlaðu at geva Hvassa ein skarpan gang.

Tað sá eisini leingi út til, at bæði Drekin og Tambar kundu steðga Hvassa, men í endaspurtinum settu genturnar á Hvassa alt uppá pláss, og vunnu sostatt bæði ólavsøkuróðurin og meistaraheitið.

Eftir róðurin fingu vit orðið á Ingibjørg Reinert, róðurskvinnu á Hvassa. Hon var ovurfegin um sigurin á ólavsøku.

- Hetta følist ordiliga deiligt at vinna FM og ólavsøkuna. Fleiri siga, at tað er øgiliga keðiligt ikki at vinna ólavsøkuna, tá man hevur vunnið FM, og tí hevði tað nógv at siga fyri okkum eisini at vinna gull í síðsta róðurin, segði Ingibjørg.

Tað gekk annars ikki so væl hjá Hvassa í ólavsøkuróðrinum, tí stóran part av róðrinum vóru bæði Drekin og Tambar framman fyri tær, men í endaspurtinum megnaðu tær tó at kempa seg upp á fyrsta plássið.

- Eg veit ikki heilt, hvat hendi hjá okkum í dag. Eg haldi, at vit róðu gott, men alt riggaði bara ikki ordiliga sum tað skuldi. Vit vistu tó, at vit høvdu ein øgiliga góðan endaspurt, sum kundi bjarga okkum, og tað gjørdi hann eisini í dag, segði ein stórsmílandi Ingibjørg.



*Málið hjá okkum var at vinna bæði meistaraheitið og ólavsøkuróðurin, og við sigrinum hava vit eisini víst, at vit eru best, segði ein stórsmílan*

# Tvær gull til Sílið a

**Kappingin hjá 5-mannaførum við kvinnum hevur verið rættiliga hørð í ár, og síðstu róðrarnar hava serliga Sílið og Ørnin kappast um fremsta plássið. Á ólavsøku var tað tó Sílið, sum fór avstað við øllum. – Nú hava vit víst, at vit eru best, sigur Hildigunn Niclasen hjá Sílinum**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað hevur ikki verið lætt at roknað út undan einum róðri hjá 5-mannaførum við kvinnum, hvør fór at vinna hann, tí kappingin hevur verið sera hørð í ár, og fleiri manningar hava verið um boðið til fremstu plássini.

Fyrsta róðurin á árinum megnaðu kvinnurnar umborð á Sílinum at vinna, men eftir hetta steðgaði eitt sindur upp hjá teimum. Á Sundalagsstevnu vann Frúgvin, og á Jóansøku eydnaðist Ørnini at vinna róðurin, og tí var sera nógv, sum bendi á, eftir fyrstu tríggjar róðrarnar, at kappingin hjá 5-mannaførum við kvinnum fór at gerast tann mest spennandi í ár.

Sjálvt um tað ikki gekk so væl hjá Sílinum á Sundalagsstevnu og á Jóansøku, so vóru tað tó tær, sum førdu í samlaðu FM-kappingini, tvey stig framman fyri Frúnna á øðrum plássi og fýra stig framman fyri Fípuna Føgru og Ørnina á triðja plássi.

Eftir Jóansøkuna avgjørdu kvinnurnar umborð á Sílinum tó í roynd og veru FM-kappingina, tá tær vunnu sannførandi sigrar á bæði Varmakeldu og á Fjarðastevnuni, men tað lá tó alíkavæl í luftini, at sjálvt um FM-kappingin var at kalla avgjørd, so kundi alt henda á teimum báðum síðstu stevnunum.

Og á vestanstevnu var so aftur ein nýggjur vinnari funnin. Hesa ferð endaði Ørnin aftur ovast, og so vóru nógv sum fóru at tosa um eina harða kapping millum júst Sílið og Ørnina í síðsta róðrinum á ólavsøku.

### Sílið stríddi seg til sigurs

Og tað vóru eisini júst hesir báðir bátarnir, sum løgdu harðast út á ólavsøku, men